Fríggjadag 7. kl. 16.10

Sound of Music
Risa-succe'in hjá Roger og Hammerstein byggir á sonnu um Trapp-húskið í Eysturríki. Í 1938 flýggjaðu tey undan nazistunum í heimlandinum, og royndu í staðin at skapa sær eina nýggja tilveru. Við 5 oscar-virðislønum er hetta mest heiðraði musical í filmssøguni.

Fríggjadag 7. kl. 20.25

Okkara kokkar
Hesaferð gera kokkarnir: Marinerað lambskjøt við grønmetisblanding, omaná verður heit sjokolátakøka við fruktum og ísi. Eisini gera teir rabarbukompott og frukt afturvið.

Fríggjadag 7. kl. 21.55



Svøvnloysi í New York
Stand-up komikarin, Dave Atell, ferðast í náttarlívinum í New York í svøvnleysu tilveru síni. Á ferð síni í náttarlívinum kemur hann at kenna nógv fólk, sum hann helst ikki vildi kent við á alljósum degi, og hetta fær hann at hugsa nakað meira um lív sítt.

Fríggjadag 7. kl. 22.55

Mechanic – mannajakstranin
Leigudrápsmaðurin.
Arthur Bishop er ein einsamallur úlvur, sum dámar best at vera einsamallur. Men tá hann ger Steve McKenna til lærling sín, gloymir hann vanliga varsemi sítt. Skjótt dugir steve allar snildurnar í yrkinum, og lærumeistarin hevur óavmarkað álit á honum.

Leygardag 8. kl. 15.00

Holiday Airport
Túsundtals bretar ferðast um flogvøllin í Palma de Mallorca á hvørjum ári á antin út- ella heimferðini til væl dámdu frítíðaroynna. Men hvussu er gerandisdagurin hjá teimum, sum starvast á einum ørkymlandi flogvølli, har avlýsingar og kreppur eru partur av arbeiðinum.

Leygardag 8. kl. 19.30

Íverksetarar
Fimm góð hugskot og fimm søgur um at seta nakað í verk. Birgit Hvidkær hevur eitt hugskot, sum hon trýr upp á, og nú skal hon fáa onnur at halda, at hennara hugskot er nakað heilt serligt.

Leygardag 8. kl. 20.00

Satsa
Luttakarar: Hervør Niclasen, sjúkrahjálpari, Tórshavn, Oddvør J. Jacobsen, Tórshavn og Sámal Olsen, KT-maður, Argir

Leygardag 8. kl. 23.00

Robocop2
Detroit er um at verða heilt útruddað. Løgreglan í býnum er fyri langt síðani fíggjað, og Robocop er nú tann einasti, sum kann bjarga íbúgvunum frá brotsmannaliðnum, sum hevur tikið ræðið. Brotsmenninir gerast alt meira harðrendir, og tí má Robocop av álvara skunda sær.

Sunnudag 9. kl. 12.10

Søgulig arbeiðspláss
Tey framleiddu heimsins størstu kanón. Í áratíggju vóru tey fortreytin fyri menninginga hjá týska herðinum og framstigunum hjá nazismuni. Søgan um Krupp-dynastiið og teirra arbeiðsháttt, har tey als ikki vóru kræsin, tá starvsfólk skuldu setast.

Sunnudag 9. kl. 19.00

She's all that
Vakrasti sjeikurin á skúlanum, Zach Siler, verður støttur undan fráfaringarveitsluni dumpaður av vinkonu síni, sum heldur vil hava ein sjónleikari úr eini tápuligari sendiroð. Fyri at hevna seg veddar Zach við vinmann sín, hvørt hann er førur fyri at fáa sær eina nýggja gentu innan veitsluna.

Sunnudag 9. kl. 19.40

Michael Collins
Eftir páskauppreisturin í 1916 veðrur Michael Collins fongslaður. Tá hann nakað seinni verður leyslatin, fer hann saman við vinínum, Harry, í gongd við uppbyggja undirgrundsherðin, sum skal tryggja Írlandi eina frælsa framtíð.

Sunnudag 9. kl. 21.35

Lívið er vakurt
Vit eru í Itala í 30-árunum. Guido er skotin í lærarinnuni Doru. Hóast hon longu er trúlovað, roynir Guido øll brøgd fyri at fáa hana. Og skjótt rennir saman teirra mílum, og tey verða ein lítil familja, men Annar Heimsbardagi brestir á. Guido er jødi, og tí hava hann og sonurin upplivingar í væntu, sum tú bara kemur heilskapaður burtur úr, um tú hevur lívsmót og upp í leypin av skemtingarsomum snildi.

Mánadag 10. kl. 19.00

Ein drápsmaður millum vinir
Morðið av eini vakrari og væl dámdari ungari gentu gerst til eitt hitt torførasta og óhugnaligasta málið, sum kriminalkommiserur Patricia Staley nakran tíð hevur fingist við. Og hetta er nakað, sum av álvara roynir evnir hennara at stýra sær sjálvari.

Mánadag 10. kl. 19.10



Tá orangutangin skapar sær
Oy, oy, sum tað skrijðar, ella er tað bara so, at apan skapar sær. Vit fara handan leiktjøldini í djóragarðinum, har orangutangin, Charlie, nú er vorðin hálvgamal. Hann er at kalla til reiðar at fara hiðani, og djórapassari hansara er sjálvsagt keddur av hesum.

Mánadag 10. kl. 19.25

Verð at elska
Einsemiskenslan er óghunaliga stór hjá fólki, sum eru rørslutarnað. At fáa ein maka er ein vón, sum onkur enn hevur, men tey flestu hava givið skarvin yvir eftir at hava upplivað so nógv vónbrot í mong ár.

Mánadag 10. kl. 21.00

Kvøldvaktin
Jerry sleppur livandi frá skurðviðgerð síni, men hann verður verandi í coma. Doherty gevur fyrrverandi konu síni ein skottryggan vest, so lív hennara ikki er eins stórum vanda, men hon noktar fyri at brúka hendan.

Týsdag 11. kl. 14.45

Jenny Jones
Stripparar eru evni hesaferð. Ella rættari, ungar gentur, sum ynskja at strippa, trætast við foreldrini, sum púrasta blankt nokta fyri hesum. Er talan um ólevna, sum foreldrini vilja verja børn síni fyri, ella er talan um eitt starv sum so mangt annað.

Týsdag 11. kl. 20.00

The Avengers
Loyniligi agenturin, John Steed, skal kanna, hvør hevur tikið ræði á veðrinum í Onglandi. Alt týðir uppá, at tað er ríki og klóki sir August De Wynter, sum er brotsmaðurin, og saman við róligu Emma Peel átekur Steed sær uppgávuna at finna fram til sannleikan.

Týsdag 11. kl. 20.15

Menn forsetans
Meðan Mandy arbeiddi fyri mótstøðumannin hjá Bartlett forseta, skrivaði hon eitt notat, har hon hvassliga fanst at forsetanum og starvsfólki hansara. Nú hava fjølmiðlarnir fingið hendur á notatinum, og av øllum alvi verður nú roynt at fáa frið um hetta málið.

Týsdag 11. kl. 21.55

Maktstríð á apurnar planet
Tveir astronautar enda onkursvegna í eini aðrari tíð á ferð teirra í rúmdini. Tá teir venda aftur til jørðina, eru 2000 liðin. Klótan verður nú stýrd av apum, og hesar gera ymsar royndir við menniskjaheilum.

Mikudag 12. kl. 19.00



Plastic Fantastic
Hyggjararnir sleppa at fylgja Dr. Troilius til London, har hann er við til at fyrireika eina læknakongress. Hann hevur eisini tikið 19-ára gamla sonin, Daniel, við sær, og saman skulu teir hava nakrar álvarsligar farðir-til-son samrøður, áðrenn sonurin flytir heimanífrá.

Mikudag 12. kl. 20.00

Undan væðingini
Kanska um hundrað ár 4:4.í fjórða og seinasta parti tekur Hanus Kamban saman um og lýsir tíðina eftir, at Janus Djurhuus kom aftur til Føroya.

Mikudag 12. kl. 21.50

Stress – tann modernaða sjúkan
Stress hjá starvsfólkum kann í nøgvum førum stava frá vánaligari ella als ongari leiðslu. Men hvussu hava stjórarnir tað. Tey fólkini, sum sita við ábyrgdini fyri vinnulívið. Her verður tosað við onkrar av stjórunum í stórum donskum fyritøkum um, hvussu teirra gerandisdagur er.

Mikudag 12. kl. 21.50

Crank Yankers
Eru dukkurnar úr Muppetshow fyri børn, so eru dukkurnar í Crank Yankers so sanniliga fyri vaksin. Crank Yankers verður mett sum ein hálvgum perves parodi upp á gerandisdagin hjá okkum øllum, har trupulleikar av alskyns slag stinga seg upp.

Hósdag 13. kl. 20.00

Palmetto
Frásøgumaðurin Harry Barber hevur verið tvey ár í fongsli fyri eina mutusgølu, sum hann óvarandi fekk skuldina fyri. Ikki er hann meira enn útkomin aftur, áðrenn hann letur seg yvirtala til at gerast partur av einum væl tilrættisløgdum persónsráni.

Hósdag 13. kl. 21.00



Ekstremt-tey illastu
Gary Saunders, 42 ár, Terry Turbo, 31 ár og Gary Marin, 43 ár, hva øll til felags, at tey ikki kunnu stýra sinnalagi sínum. Gary hevur verið 10 ár í fongsli vegna harðligu framferð sína, og sjálvur hevur hann hug at samanbera seg við Dr. Jekyl og Mr. Hyde.

Hósdag 13. kl. 21.55

Krimitímin
Richie Dearne er undir illgruna fyri at selja rúsevni og skal til avhoyring hjá Frost, men alt gongur ikki sum ætlað, og Frost noyðist at lata Dearne leysan aftur. Hóast Frost hevur nógv um at vera, hevur hann ikki slept ætlanunum um at avdúka Rúsevnisseljaran Richie Dearne.

Hósdag 13. kl. 22.30



Kossurin hjá eiturkoppakvinnuni
Luis og Valentin eru í sama kliva í einum suðuramerikonskum fongsli. Valentin er journalistur og politiskur fangi í einum fascistiskum diktaturi. Luis er ein kventaslígur geikari, sum er dømdur fyri seksuellur brotsgerðir sínar. Fyri at flíggja nakað frá veruleikanum, sigur hann Valentin søguna um ein film, sum hann eina ferð sá.

Leygardagur 8. kl. 17.00

Vitin
Gestirnir í Vitanum leygardagin eru báðir Skálavíkingar.
Vit halda áfram práti Eyðun Viderø, og hin gesturin sum vit hoyra máli í er Heðin Jacobsen. Eyðun sigur eitt sindur meira frá um arbeiði sum bankamaður og hvussu hann kom í politikk.
Heðin hevur útbúgving sum skipari og el-innleggjari. Fyri tíðina arbeiðir hann sum maskinmaður á Sandoy Seafood.
Heðin sigur frá barnaárunum í Skálavík. Hvat teir spældu, og um sunnudagskúlarnar í bygdini. Hann var skipari á Fríðborg, sum hann átti saman við bróðrum sínum. Seinni hoyra vit hann siga frá um hvussu tað gekk tá ið teir gingu burtur í Eystursjónum.

Sunnudagur 9. kl. 14.15

Røddir úr norði
Á øðrum sinni verður í hesum døgum skipað fyri, at teir rithøvundar, sum eru innstillaðir til bókmenta-virðislønina hjá Norðurlandaráðnum, ferðast kring Norðurlond at lesa upp úr og greiða frá sínum skaldskapi. Høvundarnir koma eisini til Føroya, og sunnudagin verða seks av teimum innstillaðu at hitta í Norðurlandahúsinum.
Teir eru Morten Søndergaard úr Danmark, Pirjo Hassinen úr Finnlandi, Hanus Kamban úr Føroyum, Jóhann Hjálmarsson úr Íslandi, Jørgen Norheim úr Noregi og Liv Køltzow, sum eisini er norsk.
Funduin verður í Klingruni frá klokkan 14.15 til 16.00, og hann verður sendur beinleiðis í útvarpinum.

Mánadagur 10. kl. 20.30

Duldar leiðir
Mánakvøldið fer útvarpið undir at lesa bókina "Duldar leiðir" eftir Minu Reinert. "Duldar leiðir" er krimisøga við nærum øllum heiminum sum leikpalli, men størri parturin fer kortini fram í Føroyum. Jenny Alberta Williams, mamman er føroysk og pápin er eingilskmaður, er uppvaksin í India og síðani gift einum týskum aðalsmanni. Men hann doyr brádliga og Jenny flytir til Føroya at arbeiða á einum edv-virki. Sum fráliður varnast Jenny, at ymiskt løgið fer fram. Duldar leiðir er ein spennandi bók á tremur av loyndarmálum og kærleikslongsli. Katarina Nolsøe fer at lesa.

Hósdagur 13. kl. 19.00

Skapanin
Lindin fer nú at senda eina nýggja sendiroð. Røðin hevur fingið heitið Skapanin og byggir á eina greinaroð hjá Ejvind Mouritsen, sum hevur staðið í Trúboðanum fyri 3 árum síðani. Sendingarnar viðgera ta bíbilsku skapanarfrásøgnina í mun til menningarlæruna. Sendiroðin er í 14 pørtum og verður send hvørt hóskvøld kl. 19. Fyrstu ferð hóskvøldið 13. februar og verður hon endursend sunnudag kl. 17. Vertur er Dánial á Dul Jacobsen og tónleikin til røðina hevur Johannes Ólavsson gjørt.

ítróttur

SVF
Leygardagin kl. 14.50
Steypafinala, kvinnur: VÍF-VB
Leygardagin kl. 16.50
Steypafinala, menn: StÍF-Kyndil

TV3
Leygardagin kl. 14.00
Tipslørdag

CANAL+
Leygardagin kl. 15.00
Premier League: Tottenham-Sunderland
Sunnudagin kl. 12.25
Premier League: Manchester Utd.-Manchester City
Sunnudagin kl. 16.00
Premier League: Newcastle-Arsenal
Mikudagin kl. 0.30
NHL beinleiðis

CANAL+
Leygardagin kl. 19.25
Seria A
Sunnudagin kl. 19.25
Seria A

DR1
Sunnudagin kl. 15.15
Beinleiðis hondbóltur
Mánadagin kl. 10.00
V5-travet

EUROSPORT
WTA Tennis úr Paris
EuroSeries Atletik úr Gent, Belgia
Fótbóltur: Copa America
WC Skíðskjóting úr Lahti, Finnlandi
WC bobsleðu úr Calgary, Canada
WC Skíðlop úr Willingen, Týsklandi
WC Sleðu úr Winterberg, Týsklandi
HM strok úr St. Moritz, Schweiz
HM skoyting úr Göteborg, Svøriki
HM Hockey úr Æeipzig, Týsklandi

TV2 ZULU
Sunnudagin kl. 7.30
Hondbóltur: Ikast/Bording-Larvid
Sunnudagin kl. 12.55
Íshockey: Danmark-Noreg

TV1000
Leygardagin kl. 21.00
Knockout Live

TV Danmark 1
Leygardagin kl. 14.00
Bundesliga: Hertha Berlin-Schalke 04
Leygardagin kl. 16.25
Bundesliga: Wolfsburg-Bielefeld
Leygardagin kl. 02.00
Nevaleikur: Fight Night
Sunnudagin kl. 16.25
Bundesliga: Bayern München-Hamburger SV
Sunnudagin kl. 0.55
Kurvabóltur: NBA All-Star
Mikudagin klk. 19.55
Fótbóltur: Ongland-Australia

VARPIÐ
Eykablað í Sosialinum
hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 311820
Fax: 314720
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin